# Løkke vil verða seyðabóndi

**Slaturblaðið, Se & Hør, veit frá forsætismálaráðharranum at siga, at hann ætlar at keypa jørð í Føroyum, og jørðin er við Gjógv**

Leo Poulsen

Hann hevur roynt nógv innan politikk. Og hann hevur roynt seg sum súkklari. Og nú ætlar hann sær – sambært slaturblaðnum Se&Hør – at gerast seyðabóndi.

Ekstrabladet skrivar á sínari heimasíðu:

»Ifølge Se og Hør er Lars Løkke Rasmussen og hans færøske hustru Sólrun faldet pladask for de brægende uldtotter, når de har været på besøg hos hendes familje på Færøerne«.

Og við Se&Hør sigur Lars Løkke Rasmussen:

» Man skal selv passe fårene, tage dem ned fra fjeldene, når de skal klippes, og være med til slagtninger, og når kødet skal tørres osv. I årenes løb har jeg prøvet det flere gange i Sólruns familie, og nu synes vi, det kunne være sjovt at have vores egne får«.

Við sama blað sigur forsætisráðharrin eisini, at tað ikki var kærleiki við fyrsta eygnabrá, tá hann fyrstu ferð var í Føroyum, men at hann við tíðini er vorðin góður við landið.

- Hvørja ferð eg eri í Føroyum, verði eg bergtikin av náttúruni, sigur Lars Løkke Rasmussen.

Sofus Johannesen, fyrrverandi borgarstjóri við Gjógv veit at siga, at tað er við Gjógv, at Lars Løkke ætlar at keypa jørð.

- Hann hevur ofta verið á fjall við Gjógv, har vermamma hansara eigur jørð. Og tað er hesa jørðina, ið forsætisráðharrin ætlar at keypa, sigur Sofus Johannesen.

Jørðin, sum talan er um, liggur í hagapartinum Sáttarenni, ið – sjálvt um hann liggur millum Funning og Funningsfjørð – hoyrir til Gjógv.

Jørðin er tvær gyllin, og sambært røktingarmanninum í haganum, Asfinn Sigvardsen, verður vanliga tikið tveir og ein hálvur seyður upp á gyllinina, og tískil fær forsætisráðharraparið fimm seyðir um árið úr haganum, sum er 40 gyllin tilsamans.



*Lars Løkke Rasmussen fer frameftir at fara á fjall fyri seg sjálvan, og ikki sum húskallur hjá vermammuni*

Mynd: Jens Kristian Vang

Klaksvíkar Kommuna / Miðlan

# HÚS TIL SØLU



**Eldri hús mitt í býnum á einum 653 fermetra stórum grundstykki, við góðum parkeringsmøguleikum og sera góðum útsýni, verða við hesum lýst til sølu.**

Talan er um stoypt sethús á matr. nr. 1323b við Garðaveg 38 og Kjalarveg 33, bygd í uml. 1950. Húsini eru í tveimum hæddum á uml. 100 fermetrar.

Einki minstaboð verður ásett, men kommunan tilskilar sær rætt at havna øllum boðunum, um einki boð er nøktandi.

Rundsýning og fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Hans Fróða Hansen, leiðara á Vegadeild kommununnar, tlf. 410000.

Boð upp á húsini skulu **í seinasta lagi mánadagin 6. september 2010 kl. 12:00** verða kommununi í hendi á hesum bústaði:
Klaksvíkar Kommuna, Býráðshúsið, Nólsoyar Pálsgøta 32, 700 Klaksvík

Klaksvíkar Kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32 | FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 | Fax. 410001 | klaksvik@klaksvik.fo | www.klaksvik.fo




*Fleiri hava víst áhuga fyri Dimmalætting, og Løkir hava valt út trý, ið tey meta sum seriøs, at samráðast við*

# Stórur áhugi fyri Dimmalætting

**Tá Løkir keypti Dimmusamtakið var alla tíðina ætlanin, at Dimmalætting sjálv skuldi seljast burtur úr samtakinum**

Leo Poulsen

Og sambært Líggjas í Bø, stjóra í Løkir, er stórur áhugi at keypa.

- Vit hava havt prát við fleiri áhugað, og av teimum hava vit valt út tríggjar áhugaðar, sum vit meta sum seriøsir keyparar, sigur Líggjas í Bø.

Hann sigur, at enn eru ongar realitetssamráðingar farnar í gongd, og hann vil heldur ikki koma inn á, hvørjir teir tríggir seriøsu keypararnir eru.

Líggjas í Bø vil heldur ikki siga nakað um, hvønn prís teir vilja hava fyri Dimmalætting, men sigur, at prísurin er til samráðingar hvørja ferð.

Stjórin sigur, at ætlanin alla tíðina hevur veirð at fingið søluna avgreidda í hesum árinum, og at tað framvegis er málið.

Leysasølur hava gingið um, at fyrrverandi stjórin í Norðoya Sparikassa, Eyðfinn Reyðberg, skal vera á veg at keypa Dimmalætting, men hetta avsannar hann.

- Eg eri í ferð við at upparbeiða mína egnu ráðgevingarfyritøku í løtuni, og einki er í tíðindunum um, at eg skal keypa Dimmalætting, sigur Eyðfinn Reyðberg.

leo@sosialurin.fo